**AVTALA sambært § 2. í sáttmálanum**

**millum**

**Meginfelag Sjúkrakassa Føroya**

**og**

**Kommunulæknafelag Føroya**

**§ 1.**

Hendan avtala er gjørd sambart galdandi sáttmála millum MFS og KLF frá 1. oktober 2006. Víst verður til § 2. og § 50. stk. 4., tó uttan nr. 1001 og nr. 1002. í § 72.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur nú tikið endaliga avger um at seta eina nýggja vaktarskipan fyri kommunulæknaskipanina í verk, frá medio januar 2007 at rokna.
Verandi vaktøkir Norðoyggjar, Eysturoy, Norðurstreymoy, Vágoy og Suðurstreymoy, verða løgd saman í eitt vaktarøki við einum vaktcentrali á Landssjúkrahúsinum í Tórshavn.

**§ 2.**

Tríggir læknar manna nýggju vaktarskipanina, ein vaktlækni og tveir koyrilæknar. Vaktlæknin er á vakt á vaktcentralinum og annar koyrilæknin røkir vestara part av vaktøkinum, sum er Suðurstreymoyarlæknadømi (við útoyggjum), Vága Læknadømi (við útoyggjum) og øll Norðurstreymoy.
Hin koyrilæknin røkir eystara part av vaktarøkinum sum er øll Eysturoyggin og Norðoyggjar.

Koyrilæknarnir eru til taks somu tíðir sum forvaktin til miðnátt. Síðan er bert annar koyrilæknin á vakt og røkir samlaða vaktarøkið millum kl. 24 til 08.

Vaktlæknin og koyrilæknarnir hava vakt somu tíðir uttan frá kl. 24 til kl. 08 tá bert ein koyrilækni er á vakt.
Gerandisdagar er vakt frá kl. 16 til 24.
Hálvar frídagar er vakt frá kl. 12 til kl. 24.
Í vikuskiftinum og halgidagar er vakt frá kl. 08 til kl. 24.
Einans vaktlæknin og ein koyrilækni eru á vakt frá kl. 24 til kl. 08. Vaktlæknin skal verða á vaktcentralinum.

**§ 3.**

Vaktargjøldini verða sett soleiðis:
Læknin á vaktcentralinum frá kl. 16 til 24: onki vaktargjald.
Læknin á vaktcentralinum á náttarvakt kl. 24 til 08: Samsýning 320,00 kr. fyri tíman.
Koyrilæknin frá kl. 16 til 24: Samsýning kr. 125,00 fyri tíman.
Koyrilæknin frá kl. 24 til 08: Samsýning kr. 160,00 fyri tíman.
Hetta er galdandi eisini fyri vikuskifti, heilidagar og hálvar frídagar.

Gjøldini í § 72 eru galdandi, tó verða nr. 1001 og nr. 1002 í § 72 ikki tikin við.

Somuleiðis er avtalað, at vaktargjøldini eftir §2 avtalum ikki verða prístals javnaði, men skulu avtalast millum partarnar. Broytingin av gjøldunum skal avtalast millum partarnar, tó í fyrsta lagi 1. januar 2009.

**§ 4.**
Ein vaktarleiðari skal setast til at skipa fyri vaktunum, og til at hava eftirlit við, at vaktarskipanin er mannað við skikkaðum læknum. Ætlandi skal vaktleiðarin vera vaktfríur, men tó altíð vera tøkur, hann fær fasta løn frá MSF kr. 2.500 fyri mánaðin. KLF lýsur og setur starvið.

**§ 5.**
Ferðaútreislur til og frá vaktcentralinum vera goldnar sambart verandi sáttmála § 76 við 2.50 kr. fyri hvønn koyrdan kilometur. Afturat kemur endurgjald fyri tunnilsgjald, roknað sum lægsta kubbagjald.
Avroknast skal á tí fyrstu rokningini á vaktini, ið verður rokna sum nr. 0471 í § 72.
Omanfyristandandi er bert galdandi fyri teir læknar sum hava meira enn 20 km. til vaktcentralin

Henda avtala verður ikki sett í verk fyrr enn henda vaktarskipan verður góðkend av báðum pørtum og Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Tórshavn tann 1. desember 2006

**Fyri MSF**

Tórbjørn Mikkelsen

Herman J. Dam

**Fyri KLF**

Andor Ellefsen

Sten Larsen